# 200 DESIBEL Á PLANET AWARDS



Føroya fólkakærastu punkarar, bólkurin 200 spæla á Planet Awards. 200 hava vunnið nógv hjørtu við tí argandi og kontantu punkrokkfløguni, "Viva La Republica". Ummælini bæði innanlanda og uttanlanda hava verið sera góð, og á 15 teimum bestu lá bólkurin 9 vikur á ovastu rók.

Niels Arge Galan sangari og gittarleikari í 200 segði í fjør við Planet. fo, at teir høvdu væntað at fingið av grovfílini, fyri freku og argandi fløguna. Men ístaðin vórðu teir nummar eitt á einum hitlista og seldu nógvar fløgur Nú eru teir so eisini í uppskoti til tvær Planetir, og spæla á Planet Awards Galla veitsluni. Føroyar hevur flutt seg. Fólk tykjast at skilja skemtiligu tekstirnar, og børnini elska fløguna. Tað er ivaleyst heldur eingin ivi um, at áskoðararnir á Planet Awards fara at elska bólkin.

Men kanska er tað ikki bara Føroyar, sum hava flutt seg. 200 hava eisini flutt seg tónlistarliga, punkurin er ikki líka punkuttur, og fleiri av løgunum eru heldur rokkur enn punkur. Eisini er ljóðblandið av fløguni nógv vakrari. Óli Poulsen og hansara popfingrar, hava altíð dugað at snarað knøttarnar á einum miksipulti á popkendan hátt. Hetta hevur hann eisini gjørt á Viva La Republica.

# FRÆNDUR



Fáur føroyskur tónleikabólkur man hava havt so nógv hitt, sum Frændur hava havt seinastu stívliga 20 árini. Í 1984 kom fyrsta plátan hjá teimum, og síðani hevur bólkurin verið ein leiðandi bólkur í føroyskum tónleiki.

Teir hava givið fýra fløgur og ein tvísavnsfløgu út hesi árini, og á hesum útgáva er ein ørgrynna av kendum og fangandi sangum.

Sangir sum Føroyar, Eros, Mítt Land, 80'ini, Dupultsong, Minnist Tú Gildið, Hundurin Brúni og nógvir afturat. Hetta eru sangir, sum framvegis liva í besta velgående.

Hóast Frændur kann metast sum ein av gomlu bólkum í føroyskum tónleiki nú, so hava teir framvegis sera gott tak á teimum ungu.
Tá ið teir spæla til konsertir og onnur tiltøk sæst tað aftur, at tað er líkamikið, um fólk eru blaðung ella tilkomin – øll kenna sangirnar hjá teimum.

Tað er tí einki meira upplagt, enn at mastodontarnir í føroyskum tónleiki seinastu 20 árini spæla til Planet Galla.

# YGGDRASIL OG KÁRI SVERRISSON



Planet Awards tiltakið fær eisini vitjan av Kára Sverrissyni og Yggdrasil. Tey spæla heimstónleik við uppruna í føroyskum fólkatónleiki. Yggdrasil hevur í ár 25 ár á baki, og Kári Sverrisson hevur í fleiri av hesum árunum luttikið á konsertferðum saman við bólkinum kring heimin.

Eisini henda konsert er partur av FO-DK konsertferðunum. Men er somuleiðis ein partur av stóra føðingardagshaldinum hjá Yggdrasil.

Yggdrasil hevur ongantíð havt eina fasta manning, men hesi seinnu árini er tað ein kjarna, ið hevur verið við. Tey fyrstu árini, ið Yggdrasil var til, vóru teir flestu tónleikararnir skandinavar. Men í dag eru tað fyri tað mesta føroyingar, ið manna bólkin.

# PETSI TVØRFOSS



Petsi Tvørfoss hevur verið ein virkin songkvinna í fleiri ár, men tað er serliga eftir, at hon tók lut í danska Grand Prixnum, at hon av álvara hevur verið eyðsýnd í føroyskum tónleiki. Petsi hevur búð í Danmark í nógv ár, men hon hevur framvegis nógv samband við Føroyar, og hon er javnan her og hevur framførslur.

Petsi hevur eina framúr góða rødd, og hon er kanska sterkast til tónleik, sum ikk júst er Grand Prix-tónleikurin. Henni dámar væl at syngja sangir, sum eru á tann jazzkenda bógvin, og hetta klæðir henni sera væl.